## Gáva til Sclerosufelagið

Felagið hevur seinastu tíðina havt yvir 100 bússur standandi ymsastaðni runt alt landið. Peningurin, ið kom inn, verður brúktur til eina verkætlan, hvørs endamál er at finna heilivág til fólk við ólekiligu sjúkuni, Multipel Sclerose. Fólk hava latið síni 25 oyru í hesar bússur og samlaða upphæddin varð 95.000 krónur fyri allar Føroyar. Eisini hevur Norðoya Sparikassi fingið á leið 15.000 krónur inn í 25 oyrum og verður hetta latið Sclerosufelagnum, sum við hesum hevur savnað tilsamans 110.000 krónur í 25 oyrum. Petra Nysted, sum hevur sclerosu, er nevndarlimur í Sclerosufelagnum og arbeiðir í Norðoya Sparikassa, tók ímóti gávuni frá peningastovninum. Meir kann lesast á www.sclerosufelag.fo.



# Síðsta útkall fyri vegnum til Selatraðar

**- Tað er helst í evstu løtu, at byrjað verður tosa um vegasambandið til tær tríggjar bygdirnar vestanfyri Strendur. Skal fólkatalið ikki minka uppaftur meiri, má okkurt gerast nú, sigur morskranesmaðurin Jaspur Anthoniussen**




*- Rættasta loysnin hevði verið at gjørt ein tunnil av Selatrað (myndin) og norður til Oyri, heldur Jaspur Anthoniussen av Morskranes*

VEGASAMBAND
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Morskranes:** Skulu teir hjá landsverki framvegis breiðka eitt petti fyri og annað eftir á Selatraðarvegnum? Ella er ikki best at gera allan vegin av nýggjum og frá einum enda av?

Hesar spurningar setir Jaspur Anthoniussen sær, eftir at hava lisið greinarnar í Sosialinum í farnu viku, har menn úr Kolbeinagjógv og av Strondum søgdu sína hugsan um vegastrekkið millum Strendur og Selatrað.

Hann hevur lisið hetta við áhuga, og er nú ein teirra sum eisini rópar varskó: Tær tríggjar bygdirnar Kolbeinagjógv, Morskranes og Selatrað síggja ikki út til at eiga so nógvar góðar vinir á Strondum, hóast bygdin hevur havt fleiri politikkarar á løgtingi.

Tað hevur nevniliga verið trupult hjá fólki at fáa fatur á grundøkjum í bygdunum. Vegasambandið kundi verið munandi betri, eins og ein kann staðfesta, at fólkatalið er minkað munandi í tveimum av bygdunum seinastu 20 árini.

Í 1988 búðu 85 fólk á Selatrað, meðan tey í dag eru 57 í tali. Og á Morskranesi búðu 46 fólk fyri 20 árum síðani, meðan tey í dag eru 33 í tali. Bara í Kolbeinagjógv er fólkatalið vaksið hesi árini – úr 36 upp í 41.

- Tað stutta av tí langa er, at Sjóvar kommuna hevur sovið í tímanum, og hevur hugsað sera lítið um, hvussu ein kundi ment hesar tríggjar bygdirnar. Úrslitið av hesum er, at ein hevur at kalla rikið fólk úr bygdunum, sigur Jaspur Anthoniussen álvarsamur.

Ein sannroynd er tað, at eru fólk fyrst farin av bygdini, er ofta trupult at fáa tey at flyta aftur.

### Følnað blóma

Jaspur Anthoniussen býr nú hinumegin fjallið, á Skála, men hevur allatíðina fylgt væl við, hvussu gongdin hevur verið í málinum um

> *Høvdu vit átt framskygdar politikkarar, so høvdu fyri langari tíð síðani havt ein tunnil millum Selatrað og Oyri*

Selatraðarvegin.

Eins og so mong onnur, ið hava sína dagligu »gongd« eftir hesum vegi, so ynskir hann eisini, at hesi skulu hava gott og trygt vegasamband við umheimin.

Hóast ferðslan neyvan er eins stór í dag, sum hon var í tíðini tá Sundaferjan sigldi millum Selatrað og Hósvík, so er kortini eingin ivi um, at hetta vegastrekkið ikki nøktar tørvin fyri ferðsluni í 2008.

Meðan henda ferjan, ið